# Schalke 04 gevur út fótbóltsbíbliu

**Kristna trúgvin hevur stóran týdning í týska fótbóltsfelagnum Schalke 04. Herfyri varð felagið heiðrað fyri arbeiðið sítt at breiða út kristnu trúnna**

**FÓTBÓLTUR**
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



- *Vit vóna, at boðskapurin fer at tala til allar áskoðarar okkara, sigur Schalke 04-leikarin, Marcelo Bordon*




*Nýggja fótbóltsbíblian hjá Schalke 04 er vælumtókt, og er longu við at vera útseld*

Gelsenkirchen, Týskland: Í Schalke 04 hava tey havt stóra eydnu við hesi serstøku bíbliuni, sum felagið gav út herfyri.

Fyrsta upplagið uppá 5000 eintøk er longu við at vera útselt, men felagið er eisini heiðrað við miðlaprísinum "Gylta Kumpassin" fyri arbeiðið sítt at breiða út kristnu trúnna, skrivar danska blaðið Kristeligt Dagblad.

Kristni miðlafelagsskapurin KEP letur á hvørjum ári 55.000 krónur til persónar ella felagsskapir sum samsýning fyri góðar frásagnir um kirkju og kristnu trúnna í fjølmiðlunum.

Forsetin í Schalke 04, Josef Schnusenberg, venjarin Andreas Müller og brasiliski fótbóltsleikarin Marcelo Bordon vóru til staðar við heiðursløtuna.

- Við hesi bíbliuni ynskja vit at bera fram ein vitnisburð um trúgv okkara fyri stuðlum okkara, samstundis sum vit takka Gudi, sigur Marcelo Bordon.

Hann vónar, at boðskapurin í bíbliuni ikki fer at enda á eini hill undir liðini á øðrum áskoðaralutum, men at hann fer beint inn í hjørtuni á fólki.

### Lat upp hjartað

Nýggja Schalke 04-bíblian hevur búmerkið hjá felagnum á forsíðuni og hevur annars teir bláhvítu litirnar hjá felagnum.

Eins og aðrar bíbliur hevur henda bæði Gamla Testamentið og Nýggja Testamentið, umframt eitt serligt ískoyti har spælarar, forsetin og venjarin siga frá sínum viðurskiftum við Gud.

Marcelo Bordon greiðir eisini í greiðum orðum frá, hvat kristna trúgvin hevur at siga fyri hann.

- Eg havi latið hjartað mítt upp fyri Jesusi, og eg fái nýggja megi frá Gudi hvønn einasta dag. Eg fann fyrst trúnna á Gud, tá eg var í eini truplari lívsstøðu.

- Men nú eri eg glaður um, at eg kann geva trúnna víðari til míni børn, skrivar hann í Schalkebíbliuni.

Henda fótbóltsbíblian er tann fyrsta av slíkum slagi í Týsklandi. Men í fjør var felagið út ein bók, har fleiri av spælarunum søgdu frá trúgv síni. Bókin varð prentað í 50.000 eintøkum og útseld stutt eftir.

# Songbók Guds Fólks kemur útaftur

**Tað er komið væl á leið at tilrættisleggja nýggju útgávuna av Songbók Guds Fólks. Sangbókin verður væl størri enn tann, ið nú verður nýtt í føroysku brøðrasamkomunum**

**SANGBÓK**
*Snorri Brend*



*Nú fáa fólk í Brøðrasamkomunum fleiri sangir at brúka til tiltøk teirra*
*Mynd: evr.fo*

Fyrsta stóra sangsavnið av andaligum sangum undir hesum navni kom út í 1952.

Í 1976 - altso 24 ár seinni - kom onnur útgávan, sum var eitt sindur størri enn hin fyrra.

- Nú eru 32 ár liðin, síðani seinasta útgávan av Songbók Guds Fólks kom út. Nógvir sálmar og sangir eru komnir aftrat síðani tá, og sum verða nýttir í samkomunum, verður sagt.

Tað skilst, at nýggja útgávan fer at telja umleið 2000 sangir, so talan er um eina rættiliga stóra sangbók.

Nýggja sangbókin kemur út í næstum.